e-mail: sveinur@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Jens Kristian og teir eru fullir í sjálvsáliti

*Fótbóltur: Liðformaðurin á landsliðnum var við í 56 minuttir, tá Ayr United aftur fekk trý stig á útivølli*

Ayr United við Jens Kristiani Hansen millum teir fyrstu ellivu kom við sama undanvindi inn í nýggja árið, sum teir høvdu mesta partin av síðsta mánaði. Sjálvsálitið er í topp, og tað sæst aftur á spæligleðini og spælihuginum.

Mánakvøldið var Ayr United á útivølli, og 2–0 sigrinum á botnproppinum Clydebank lyfti føroyska liðið í skotskum fótbólti sær eitt pláss upp á støðutalvuni. Ayr United hevur á sætta plássinum 26 stig og fór eitt stig framum Inverness CT, sum greiddi 1–1 á útivølli móti Livingston. Raith Rovers, sum í síni tíð sendi GÍ úr Europa Cup, er á fimta plássi. Hesa ferð vunnu teir 3–0 á heimavølli móti Dunfermline Athletic. Raith Rovers hevur 32 stig. Teir hava spælt nítjan dystir, meðan Ayr United og flestu av hinum liðunum hava spælt 21 dystir.

St. Mirren er framvegis oddalið, men gongdin hjá teimum er ikki, sum hon var fyrri í kappingini. Eftir tapið á heimavølli móti Ayr United megnaðu teir bara 1–1 á heimavølli móti Greenock Morton. Airdrie, sum Air United síðst vann 5–0 ímóti, tapti hesa ferð á heimavølli 2–0 móti Falkirk.

**Stórt sjálvsálit**

Skotsku fjølmiðlarnir vita at siga, at Ayr United hevði bóltin nógv størsta partin av tíðini mánakvøldið. Teir løgdu stórt trýst á beinanvegin, og longu tá tveir minuttir vóru farnir var um reppið, at teir fingu mál, men ungi málverjin hjá heimaliðnum bjargaði væl.

Sjey minuttir vóru farnir, tá Hurst kom ímillum jánkasliga afturlegging, og so var einki at gera hjá málverjanum. Fimm minuttir seinni bjargaði verjuspælari hjá Clydeband á strikuni, og tað hevði ikki verið við síðuna av, um leiðslan hjá Ayr hevði verið størri enn 1–0, tá teir fóru at hvíla seg.

Longu tríggjar minuttir eftir steðgin økti Rogers um leiðsluna, tá hann úr 20 metra fjarstøðu sendi fríspark í kassan. So tóku teir í Ayr sær meiri av løttum. Jens Kristian Hansen, sum í útgangsstøðuni var á miðvøllinum, varð skiftur út, tá 56 minuttir vóru farnir, og seinni vórðu tveir aðrir skiftir út. Heimaliðið royndi at trýsta fyri at sleppa upp í part aftur, men tað eydnaðist teimum ikki at skora.

Komandi leygardag skal Ayr United spæla á útivølli móti Raith Rovers. Jens Martin Knudsen var ikki á liðnum hjá Ayr United mánakvøldið, tá 901 áskoðarar hugdu at. Vit søgdu í síðstu viku, at Jens Martin hevur ikki verið á besta liðnum enn. Tað er rætt, at hann hevur ikki spælt saman við Jens Kristiani Hansen, men hann vardi málið í tveimum dystum á besta liðnum, áðrenn Jens Kristian Hansen kom til Skotlands.

jh



*Jens Kristian, sum her sæst í hornatøkum við íslendingarnar úr Leiftri, hevur rættuliga fingið vind í seglini seinastu tíðina, og mánakvøldið gjørdist tað til enn ein sigur saman við liðfeløgunum úr Ayr United.*



## Við føroyskum búmerki

*Restina av hesum kappingarárinum skal Gudrid Nolsøe av Tvøroyri leika í donsku elituseriuni við búmerkinum hjá Delta Seafood á troyggjuni*

Síðani 18 ára gamla Gudrid Nolsøe av Tvøroyri í summar fór til Odense, har hon nú gongur á HF, hevur hon rættuliga gjørt vart við seg í flogbóltshøpi.

**Kom beint á liðið**

Beinanvegin hon kom til Danmarkar, fór hon undir at venja saman við Fortuna Odense, sum hevur lið í donsku elituseriuni.

Hetta er annars sama felag, sum Bárður Mikkelsen leikar fyri, og tað var eisini Bárður, sum spurdi venjaran, um tað var møguleiki hjá Gudrid at venja við besta kvinnuliðnum.

Skjótt gjørdist venjarin greiður yvir, at føroyski landsliðsleikarin hevði góð evni, og tá kappingin fór í gongd, var Gudrid framvegis millum genturnar í 1. liðshópinum.

Sjálv heldur Gudrid, at tað hevur gingið hampuliga gott, bæði persónliga og hjá liðnum, sum í løtuni liggur á einum fjórða plássi, og m.a. komu tær í hálvfinaluna í steypakappingini.

Sum vera man, so er støði í donsku elituseriuni væl hægri enn her heima, og Gudrid sigur eisini, at tær gera rættuliga nógv við venjingina har niðri.

Einar 3-4 ferðir um vikuna verður vant, umframt at tær hava styrkisvenjing.

**Dýrt limagjald**

Ein bági við at leika í danska felagnum er tó, at limagjaldið er óvanliga høgt, um sammett verður við tað limagjald, sum føroyskir ítróttaríðkarar rinda.

Árliga er talan um 1.700 kr. og tað er ein heldur stór upphædd, um tú ert lesandi, og ikki hevur annað enn lestrarstuðulin at taka av.

Gudrid gjørdi tískil av, at spyrja seg fyri her heima, og á Delta Seafood á Tvøroyri vóru tey beinanvegin til reiðar at hjálpa tvørágentuni.

Soleiðis ber tað til, at Gudrid tað, sum eftir er av kappingarárinum, skal leika í fremstu flogbóltsrøðini í Danmark við einum føroyskum búmerki á bringuni.

Gudrid sigur annars, at hon gjørdi av at spyrja seg fyri hjá Delta, við tað at hetta er eitt virki, sum alla tíðina hevur sýnt stóran áhuga fyri at stuðla upp undir ítróttarligu menningini hjá ungfólkunum har suðuri, eins og tað fyri tað mesta eru ungfólk, sum starvast á virkinum.

Víðari sigur hon, at hon er sera fegin um stuðulin, tí sum hon sigur, so er hetta ein hampuliga stór upphædd, tá tú bert hevur studning at liva fyri.



# Ferð komin á fótbóltsmylluna

*Feløgini hjá øllum føroyingunum í superliguni eru partar av broytingum í donskum fótbólti*



*Jákup Mikkelsen skal nú hava nýggjan stjóra, við tað at Kenneth Wegner í vikuni hevur fingið sekkin*

Í jólafrítíðini hevur ikki verið so nógv at hoyrt um fótbóltssøgur í Danmark, men í hesi vikuni er rættulig ferð komin á aftur, og øll tey trý feløgini, sum hava føroyskar spælarar í superliguni, hava í vikuni verið umrødd í sambandi við sáttmálar av ymiskum slagi.

Í hesi vikuni eru feløgini farin undir fyrireikingarnar til nýggja fótbóltsárið, og fyrsta søgan, sum Jákup Mikkelsen og hinir í oddaliðnum í superliguni, Herfølge, hoyrdu í hesi vikuni, var, at nú hevur Kenneth Wegner fingið sekkin sum stjóri í Herfølge.

Tá Jákup Mikkelsen í 1994 kom til Herfølge, var Kenneth Wegner ein av liðfeløgunum. Verjuspælarin, sum var við í landsliðshópinum, tá Danmark í 1992 vann EM í Svøríki, spældi til á heysti í 1996, tá hann burturav fór at røkja stjórastarvið í felagnum.

Stutt fyri jól skrivaði Kenneth Wegner saman við Jákupi Mikkelsen undir sáttmála, sum ber við sær, at føroyski málverjin skal spæla í Herfølge fram til á sumri í 2001. Nú hevur Kenneth Wegner einki at gera í Herfølge. Formaðurin í Herfølge, sum eitur eitt so føroyskt fótbóltsnavn sum Martin Juul, segði mánadagin, at partarnir høvdu gjørt av at skiljast, tí teir vóru ikki samdir um framtíðar politikkin hjá Herfølge, men sambært donsku fjølmiðlunum er søgan tann, at stjórin hevur fingið sekkin.

Í gjár var ikki greitt, hvør nú skal vera stjóri í felagnum, men tað er neyvan at skjóta nógv við síðuna av, um vit gita, at John Faxe Jensen fer at hava ein uppaftur størri leiklut í Herfølge nú, enn hann hevur havt, síðani hann kom til felagið 1. juli í fjør.

Fyritreytirnar at standa seg Herfølge er í vetrarsteðginum oddalið í bestu donsku deildini, og eisini í jólafrítíðini hevur verið tosað og mett, um teir fara at megna at vinna DM, ella heldur nær teir fara at detta afturum t. d. Brøndby, sum hevur keypt fleiri spælarar úr Noregi og Svøríki, umframt at teir hava fingið svenskan venjara.

Møguleikarnir hjá Jákupi og teimum eru ikki minst treytaðir av, at teir halda uppá fólkið, og at teir ikki fáa nógv leikbann og nógvar skaðar at dragast við.

Fyri jól ljóðaði, at liðformaðurin og álitismaðurin í verjuni, Henrik Lykke, var á veg í eingilskan fótbólt. Bæði Reading og Charlton søgdust hava hug á honum, men í fyrstu atløgu spurdist einki burturúr. Nú sigst, at bæði feløgini framvegis eru áhugað at keypa, og at eisini týska Karlsruhe, sum er í tyngra endanum í næstbestu deildini, hevur víst Herfølge manninum áhuga.

Henrki Lykke er 29 ára gamal. Hann sær høvið sum tað síðsta at koma út um eingjagarðarnar at spæla fótbólt, men hann hevur ikki mist fótafestið:

– Um eingin sáttmáli er skrivaður, tá januar mánaði er liðugur, so verði er í Herfølge, staðfestir hann.

**Selja og keypa spælarar**

Tá Jákup Mikkelsen í heyst var í Leeds og royndarvandi gekk tað sera stillisliga fyri seg. Tíðindini komu fram í Ítróttarsosialinum, men í donsku pressuni vórðu tey ikki tikin upp á tunguna. Danska pressan man einki hava hoyrt um hetta, tí teir tykjast hava stóran áhuga fyri keyp og sølu, eisini tá talan er um aðrar spælarar enn teir, sum hoyra til á landsliðnum. Um ársskiftið hava teir verið skjótir at siga frá, tá tað hevur ljóðað, at onkur dani hevur royndarvant í lægru deildunum í Onglandi, og í fyrrakvøldið ljóðaði, at Søren Frederiksen, sum í 2. hálvleiki var í álopinum hjá AaB, tá teir spældu vígsludyst á Tórsvølli, skal royndarvenja í Leicester, sum spælir í bestu deildini í Onglandi.

Í hesi vikuni hevur ljóðað, at ein av liðfeløgunum hjá Toda Jónsson í FCK, verjuspælarin Diego Tur, er á veg til Manchester, og harvið kunnu vit staðfesta, at eingilski fótbóltsheimurin framvegis eygleiðir felagið hjá føroyska álopsmanninum.

Tað er kortini ikki stórfelagið Manchester United, men grannarnir hjá teimum í Manchester City, sum sigast hava víst áhuga fyri verjuspælaranum. Seinnu árini hevur tað ikki gingið nakað serligt hjá Manchester City, men nú tykjast teir hava sett kósina aftur hagar, sum teir sjálvir og so mong onnur hava mett, at teir hoyra heima. Manchester City er fremst í næstbestu eingilsku deildini.

Í FCK hildu teir í heyst, at álopið var ikki nóg væl mannað. Todi Jónsson verður nú mettur meiri sum miðvallari enn álopsmaður. Tað verður Thomas Thorninger eisini, og nú vilja teir hava ein at kappast við David Nielsen og Clement Clifford um fremstu plássini. Akkurát nú eru teir í FCK mest forliptir í einum norskum álopsmanni. Hann eitur Harald Brattbakk, sum er 28 ára gamal og er á lønarlistanum í skotska Celtic. Har hevur hann spælt lítið síðstu tíðina, og tí er hann áhugaður í at skifta felag. Umframt FCK eru franska St. Etienne og fyrrverandi felagið hjá honum, norska stórfelagið Rosenborg, áhugað.

Harald Brattbakk, sum var í norska HM hópinum í Fraklandi í 1998, hevur spælt átta landsdystir, og hann hevur skotið trý mál á landsliðnum, har hann hesa síðstu tíðina hevur havt tað torført í kappingini við m. a. Ole Gunnar Solskjær og Tor Andre Flo.

Tað sigst, at Celtic vil í hvussu so er hava seks milliónir danskar krónur fyri norska spælaran, og so fæst at síggja, hvørt av feløgunum, sum kappast um hann, fer longst niður í lønarposan.

**Nýggi venjarin**

Í gjár skrivaðu vit, at felagið hjá Óla Johannesen, AGF, skal hava nýggjan venjara nú beinanvegin. Upplýsingarnar høvdu vit frá Århus Stiftstidende í fyrradagin. Í gjár vórðu tíðindini alment váttað, men tað hongur eitt sindur øðrvísi saman, enn vit søgdu í gjár. Nýggi venjarin, Ove Christiansen, sum var sera nógv avhildin í Viborg, tekur ikki við starvinum í AGF fyrrenn 1. juli. Peter Rudbæk heldur fram sum venjari í AGF til 30. juni. Tá fer hann úr felagnum, og so er ætlanin, at hann skal taka venjarastarvið í AaB á seg 1. januar komandi ár.

Ove Christiansen er, sum vit søgdu í gjár, venjari, hjá danska U-18 landsliðnum, og hann fer at halda fram í tí starvinum inntil 30. juni.

jh



*Peter Rudbæk verður verandi í venjarasessinum hjá AGF fram til kappingarárslok*



*Eftir at Todi saman við fyrrverandi álopsfelaganum, Thomas Thorninger, nú er farin longur aftur á vøllin, leitar leiðslan í felagnum nú eftir nýggjum álopsevnum*

## Tjóvstarta

*Í kvøld verður fyrsti dysturin í endaumfarinum í hondbólti leiktur*

JÁKUP MØRK

Nú vit eru farin um ársskiftið, munnu flestu hondbóltsáskoðararnir vera farnir at hugsa um, hvussu leikur fer at fara í avgerandi dystunum í endaspælinum.

Flestu liðini leggja ikki til brots fyrr enn í vikuskiftinum, men longu í kvøld verður eitt slag av premieru, tá vestmenningar skulu hýsa uppgerðini móti hoyvíkingum.

Verður hugt at avrikunum hjá liðunum báðum í grundspælinum, er ikki nógv at ivast í, at VÍF er greiður favorittur at vinna dystin.

Hoyvíkingarnir munnu heldur ikki hava tær heilt stóru vónirnar undan dystinum, men hóast tað, so kann talan sjálvsagt gerast um eitt óvæntað úrslit, og tá liðini bæði møttust í grundspælinum, vóru hoyvíkingar bert 3 sekund frá at fáa annað stigið suður aftur við sær.